Álit

í

løgtingsmáli nr. 98/2022: Uppskot til løgtingslóg um kapping

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum, hevur lagt málið fram tann 31. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 13. apríl 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. og 26. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Kærustovn, Kappingareftirlitið, Løgmálaráðið og Høgna Hoydal, landsstýrismann í uttanríkis- og vinnumálum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Galdandi lóg um kapping, sum bleiv sett í gildi í 2008 við seinni broytingum, kom í staðin fyri lógina um príseftirlit. Tá bleiv mett, at lógin um príseftirlit var ótíðarhóskandi, og at javnbjóðis kapping við marknaðartreytum er besta trygd fyri borgaran fyri, at prísstøðið á vørum og tænastum gerst best møguligt.
Her er talan er um nýggja kappingarlóg, ið hevur til endamáls partvíst at dagføra galdandi kappingarlóg og partvíst at nágreina virkisøkið hjá Kappingarráðnum og Kappingareftirlitinum.

Høvuðsbroytingarnar í uppskotinum eru hesar:
Eftir hesi lógini fer Kappingareftirlitið at hava dagligu umsitingina av lógini um hendi og tekur avgerðir vegna Kappingarráðið, meðan Kappingarráðið hevur umsjón við arbeiðinum hjá Kappingareftirlitinum og tekur avgerð í málum, ið hava stóran ella prinsipiellan týdning fyri føroyska samfelagið.

Eisini fer Kappingareftirlitið at fáa heimild til at luttaka í norðurlendska samstarvinum, sum er ímillum Norðurlond. Føroyar eru í dag ikki partur av norðurlendsku avtaluni frá 2001, vegna manglandi heimild tá at lata øðrum kappingareftirlitum trúnaðarupplýsingar. Hesa heimild fekk Kappingareftirlitið við lógini frá 2007, og tí er tað skilagott, nú Norðurlond hava dagført teirra kappingarlógir, at Føroyar gerast partur av norðurlendsku samstarvsavtaluni.

Kappingareftirlitið fær við hesi lógini eina nýggja heimild at taka gjald fyri viðgerð av samanleggingum. Viðgerð av samanleggingum er tíðarkrevjandi og skal verða avgreidd innan ásettar tíðarfreistir, og nevndin er samd í, at tað er rímiligt, at eitt gjald, ið svarar til tað, sum viðgerðin av samanleggingini kostar, verður álagt samanløgdu feløgunum. Satsurin er 0,1% av umsetninginum hjá samanløgdu feløgunum, tó í mesta lagi kr. 50.000 fyri einfaldar samanleggingar og kr. 300.000 fyri vanligar samanleggingar.

Eisini verður Kappingareftirlitinum heimilað, við fyrisitingarligari sekt, skjótt at loka mál fyri brot á kappingarlógina, treytað av, at fyritøkan hevur játtað seg sekan. Harumframt verður revsiramman fyri tilætlað grov brot á ásetingarnar um kartelvirksemi herd munandi til at kunna verða 1 ár og 6 mánaðir fongsul.

Við hesum uppskoti verður eisini freistin hjá Kærustovninum at taka avgerð í málum, sum eru løgd fyri hann, longd úr 6 vikum til 8 vikur. Avgerð og tilfar í kappingarmálum er sum oftast rúgvismikið, og tí verður mett hóskandi, at freistin hjá Kærustovninum at taka avgerð verður longd við 2 vikum.

Ein samd nevnd hevur í viðgerðini lagt stóran dent á, at eftirlitið hjá Kappingareftirlitinum, á økjum við monopol og duopol líknandi marknaðarstøðum og har kappingin er avmarkað, eigur at herðast. Eisini eigur kappingareftirlitið at gera upplýsandi marknaðarkanningar, har almennur stuðul er við til at broyta marknaðarstøðuna, fyri í størst møguligan mun at tryggja, at ætlaði stuðulin kemur brúkaranum til góðar. Eisini er týdningarmikið, áhaldandi at kanna strukturellar støður á marknaðinum, ið kunnu hava óhepnar avleiðingar fyri brúkaran. Ymiskir møguleikar hava verið umrøddir, ið hava til endamáls at tryggja endabrúkaran betur á marknaðum við avmarkaðum útboði. Hesum sjónarmiði tekur landsstýrismaðurin fult undir við. Nevndin metir, at skotbráið til at gera hesar broytingar nú er ov stutt, men mælir til, at landsstýrismaðurin ber broytingarnar í tingið á ólavsøku.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 9. mai 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen